snørið. Tað var skjótt greitt, at okkurt ógvuliga tungt var á. “Hava tit knýtt á hjá mær?” rópar hann. Hetta var ofta gjørt fyri at stinga monnum skør. “Nei,” var svarið. “So mugu tit koma at hjálpa mær,” og beinanvegin vóru tríggir mans har og hjálptu honum at draga. Tá vóru tveir stórir 100 punds kalvar á. Dánjal kastaði aftur, og hann fekk enn eina ferð ein kalva og eina longu. Triðju ferð hann kastaði, fekk hann ein tosk og eina stóra hýsu. Hann koyrdi beinanvegin hýsuna i pottin. Hon hevði bæði rogn og nógva góða livur. Hetta var góður matur. Tá tørnaðu allir út. Hetta var ein kærkomin máltíð, og so fóru allir menn til snørini.

Hýsa hevur so ógvuliga stórt uggabein, og Dánjal snøggaði uggabeinið á hesi hýsu til eitt lítið skaft til ein kniv. Hann fekk sær eitt sindur av teinajarni og smíðaði blaðið av tí og gjørdi so hólk um. Umborð vóru øll amboð, eisini loddigreiðir, so hetta lat seg væl gera. Menninir undraðust, tá ið hann vísti teimum knívin, so lítil og fittur hann var.

Kalvarnar kom John hjá Gynnu eftir við hestavogni. Jóannes hja Gynnu var við Slatrinum. Hann segði við Dánjal: “Ein kalva skal tú hava.” Hann varð koyrdur í ein 200 pund sekk, og Dánjal fetlaði sær hann uppá ryggin og so til gongu við kalvanum á bakinum í vindi og kavaroki. Niðankomin var kalvin skorin sundur og fingin til sættis. Høvdið gav hann Drikku, konu Mikkjals.

1919 verður rópt tað góða fiskiárið. Teir fiskaðu 100 skippund á bankanum og 300 skp. undir Íslandi, og úrtøkan bleiv 2.500 kr fyri árið. Hetta vóru nógvir pengar tá, og Dánjal keypti sær eina nýggja kúgv, tá ið hann kom heim.

## Flaggaði fyri dóttir

Dánjal var við Slatrinum til 1923 í fyrsta umfari. Í 1921 fekk hann dóttrina, sum hann so inniliga hevði ynskt sær. Hann átti tríggjar synir frammanundan, og hann bleiv argaður eitt sindur við tí. Teir vóru Hilmar, Petur og Sigurd. Táið triði drongurin kom, skuldi hann siga heldur kvettisliga: “Aftur ein drongur.” Men nú er so dótturin, Paula, komin. Illa gekk at fáa samband við Slatrið. Jens á Lava var komin beint úr Føroyum, og hann fær so sagt Dánjali, at hann hevði fingið eina dóttir. Hetta hoyrir skiparin, og hann koyrir flaggið í topp. Tað hevur verið frøði á Dánjali, tá ið Slatrið lá við Ísland og flaggaði, tí hann var blivin pápi at eini dóttir. Seinni kom so ein sonur afturat, Hans Pauli.

Í 1923 fór Dánjal við Atlantic. Jógvan á Hvítanesi var bestimaður, og teir vóru eisini saman har í 1924.

Í 1925 var Dánjal við Galway við Jógvan á Hvítanesi sum skipara.

## Róði til Hvítanesar í weekend

Ludda Christian og Mouritsen høvdu umframt skipini eisini hvalastøðina á Gjánoyri, og Dánjal fór norður hagar at vera kokkur í 1926. Harald var formaður og gav honum leiðbeining um, hvat hann skuldi gera. Tveir hvalabátar hoyrdu til støðina. Dánjal skuldi lata proviant umborð í hvalabátarnar. Alt skuldi vigast og skrivast upp, og hann skuldi eisini baka breyð til teir, og teir um 30 menninar, ið har arbeiddu. Har var stórur bakarovnur, sum kundi baka 50 breyð i senn.

Dánjal róði hvørt leygarkvøld hendan langa teinin til Hvítanesar fyri at vera heima í vikuskiftinum, og so norður aftur sunnukvøld. Hann segði, at hann fekk so nógv tvøst, sum hann kundi kóka til kýrnar. Hann hevði tvær kýr tá. Tann sum mjólkaði mest gav 17 litur. Tær fingu eitt sindur av meis eisini.

Í 1927 fór Dánjal aftur við Marshall sum kokkur. Tað var eisini við Marshall, at hann fyrstu ferð bleiv kokkur í 1907.

Palli á Lava segði honum tá, hvussu farast skuldu fram. Hann skuldi kóka saltkjøt tríggjar dagar um vikuna, týsdag, hósdag og sunnudag. Hann skuldi gera súra og søta sós til saltkjøtið sunnudagar, og hetta dámdi manningini so væl. Gerandisdagar vóru ertrar kókaðir saman við saltkjøtinum, og sunnudagar var ofta budingur omaná. Annars skuldi hann kóka rísuppu ella byggreyt við sviskum í, og dúrkið skuldi feiast væl hvønn morgun.

Stundum gjørdu teir sær framíhjá keksasteik, sum ofta enn verður tikið til av gomlum fiskimonnum. Tað var bloytt keks, og hvør maður mátti geva ein klíning av margarini og eitt sindur av sukri til, tí at provanturin var býttur. Keksasteikin fór so í ovnin. Summir hildu hana tó vera ov søta.

## Fór eftir høvdinum í havið

Hetta vóru nakrir hugleiðingar frá 1907-1912, tá ið Dánjal fyrstu ferð var kokkur, og í hesum tíðarskeiði minnist hann eisini til eina serliga hending.

Marshall lá á Havnarvág, og Dánjal var uppi í góðsinum og



*Við hesa tjørnina omanfyri Hvítanes bar til at hugna sær*

skuldi orðna okkurt. Hann slepti aðrari hondini, og hann helt, at tað, hann helt í við hinari hondini, var nóg sterkt. Men hetta slitnaði, og Dánjal fór eftir høvdinum í havið. Hann segði, at hann fór sum ein pílur gjøgnum sjógvin. Tá var tað fyri honum, sum um rópt varð á hann: “Spenn armarnar út frá”, tá fór hann líka skjótt upp aftur. Tað sigst, at Inga, sum arbeiddi á gamla hospitali, stóð har og eygleiddu hendingina.

Skiparin og stýrimaðurin kastaðu eina línu til hann, og Dánjal fekk svamblað so mikið, at hann fekk fatur á línuna, og so drógu teir hann inn á dekkið. Hann dugdi ikki at svimja, men hann segði, at hann ongantíð var bangin.

Í 1927 er Dánjal aftur við Marshall. Úrtøkan varð um 550 krónur.

## Keypti sær bát

Tá ið Dánjal kom heim vártúrin, sær hann ein bát standa á Kongabrúnni. Hann var sera hugtikin av honum. Hann tók lúkuna av maskinrúminum og hugdi at hesum spildurnýggja motori. Hann hevði grønar sylindarar og messingrør. Alt var so blankt. Hann fekk ikki eyguni frá hesum báti. Hann fekk at vita, at Poul í Geil átti bátin, og at Sofus hjá Stinu hevði smíðað hann. Seinni kom Andrias í Skorastovu, teir vóru systkinabørn, umborð til hann og sigur: “Eg havi tosað við Poul í Geil, og tú kann gott fáa bátin. Hann kostar 700 krónur.” Um kvøldið komin niðan á Hvítanes spyr hann Ingu, um hon helt, at hann skuldu keypa bátin. “Á jú, keyp tú bara bátin,” sigur hon. Tey áttu nakað av pengum, men ikki nóg mikið. Dánjal fór til



*Skipari var á Mignonette var Jens Petur Egholm, sum her er saman við konuni Fridu*

Edvard Mitens, ið var sakførari fyri teir á hvalastøðini og spurdi, um hann ikki kundi orðnað tað soleiðis, at hann fekk teir pengar, hann átti til góðar hjá hvalastøðini, sum tá var farin í gjaldssteðg. Hetta játtaði hann, og so var báturin keyptur.

Tað var frøði á dreingjunum, tá ið Fimm Systkin kom niðan á Hvítanes. Teir fóru avstað við honum, og Dánjal sá ikki bátin aftur, fyrr enn hann var langt úti á fjørðinum. Hilmar hevur verið um 16 ár og Petur 14. Sigurd var bert 10 ár, men hann segði, at teir ofta høvdu seg við til at standa á brúnni og selja fisk. Tað komdu teir seg ikki so væl til. Tá lá betur fyri hjá Sigurdi! Dánjal segði, at tá ið hann var heima, purraði hann synirnar út kl. trý um náttina at egna, og so kundu teir av og á fiska heilt nógv. Teir kundu eisini fara út eini kyrrindi og selja fyri 6-10 kr. Hetta hjálpti væl afturat til húsarhaldið. Av fiskapengunum bleiv altíð kjøt keypt til døgurða.

Sum frá leið, vóru teir fleiri, sum keyptu sær maskinbátar uppi á Hvítanesi, táið teir sóu, at tað var innløga í einum sovorðnum fari.

## Toran slerdi niður

Í 1928 var Dánjal aftur við Slater. Niklas Pauli var skipari, og Jógvan á Hvítanesi var bestimaður. Teir fiskaðu ikki nógv, tí at agnið var ikki gott hjá teimum. Teir fóru so inn at keypa agn. Men tað kom ikki nógv burturúr, tí tað var so útliðið, so teir sigldu heim.

Slater hevði fingið ein motor, og hann gekk 5 míl. Teir vóru út fyri Portlandinum, tá ið tað fór at regna so óvanliga illa. Dánjal var í koyggjuni og Jógvan við. Teir blivu útpurraðir at